Marita Petersen frá sum tingformaður

Mett verður, at størst sannlíki er fyri, at Jógvan Ingvard Olsen úr sambandsflokkinum verður nýggjur tingformaður

Nýggjur tingformaður verður valdur, tá tingið verður sett ólavsøkudag. Marita Petersen fer frá, og í hennara stað skal annar maður úr samgonguni taka við mest tignarliga starvinum hjá heimastýrinum. Vit hava ikki frætt, hvør verður tingformaður, men tað er okkurt, sum bendir á, at javnaðarflokkurin letur sessin frá sær, og at tað verður Jógvan Ingvard Olsen úr sambandsflokkinum, sum verður tingformaður. Hetta hava vit tó ikki fingið váttað.

Marita Petersen ynskir ikki at gera viðmerkingar til málið, men vit hava fingið váttan fyri bæði í javnaðarflokkinum og í øðrum flokkum, at tað er avgjørt, at Marita Petersen fer frá.

Torført val

Tað eru broytingarnar í stýrisskipanlógini og tingskipanini, sum hava gjørt, at Marita Petersen hevur valt at leggja frá sær sum tingformaður. Stýrisskipanarlógin sigur, at løgtingsformaðurin hevur hægstu tign, og tað verður roknað við, at hann skipar og hevur eftirlit við politiska arbeiðnum, sum hann ikki verður partur av. Í tingskipanini stendur, at løgtingsformaðurin tekur ikki lut í orðaskiftinum, og at hann kann ikki veljast til limi í løgtingsnevndunum.

Marita Petersen hevur ikki verið limur í nakrari nevnd, men bæði hon sjálv og aðrir javnaðarpolitikarar hava mett, at tað er betri fyri javnaðarflokkin, at hon fer úr formannssessinum, verður formaður í tingbólkinum og tekur í størri mun enn uppgávan sum løgtingsformaður loyvir á seg at markera javnaðarsjónarmið. Valið hjá Maritu Petersen hevur neyvan verið heilt lætt, tí hon hevur verið ein av politikarunum, sum hevur halgað seg mest arbeiðnum við nýggju stýrisskipanarlógini og serliga nýggju tingskipanini.

Keldur í javnaðarflokkinum siga fyri Tíðindablaðnum Sosialinum, at flokkurin tekur undir við avgerðini hjá Maritu Petersen, men spurningurin, sum stendur eftir at loysa, er, hvat javnaðarflokkurin skal hava aftur fyri frá sambandsflokkinum, um hesin fær formannin. At Marita Petersen gjørdist tingformaður var partur í samgonguavtaluni seinasta heyst.

Møguleikarnir

Ein møguleiki, sum hevur verið nevndur, er, at javnaðarflokkurin fær formannin í figgjarnevndini. Mett verður ikki, at hetta fer at lata seg gera. Partvis tí tað er óvanligt, at sami samgonguflokkur bæði hevur landsstýrismannin í figgjarmálum og formannin í figgjarnevndini, og partvis tí hetta ikki letur seg gera, tí Finnbogi Arge og sambandsflokkurin als ikki eru hugaðir at sleppa hesum sessinum.

Eitt annað býti, sum hevur verið nevnt, er, at Marita Petersen fær sessin í Norðurlandsráðnum, sum Maria Hansen úr sambandsflokkinum hevur havt. Hetta halda aðrir javnaðartingmenn vera ov lítið at fáa í býti fyri formanssessin í løgtinginum, tá hugsað verður um, at sambandsflokkurin í samgongusamráðingunum kravdi tveir landsstýrismenn umframt løgmann og aftur fyri bjóðaði javnaðarflokkinum løgtingsformannin.

Ein annar møguleiki, sum verður nevndur, er, at Marita Petersen verður formaður í nýggju uttanlandsnevndini, men so er spurningurin, hvat verkamannafylkingin sigur til tað, tí javnaðarflokkurin fer ivaleyst at eiga formannin í vinnunevndini, sum m.a. kemur í staðin fyri fiskivinnunevndina, har Henrik Old hevur verið formaður. Mett verður, at tað fer kanska at bera til at fáa kabalina at ganga upp. Hon skal vera gingin upp, áðrenn tingið verður sett.

Í skiftisreglunum fyri tingskipan verður sagt, at løgtingsformaðurin, sum sat í tingsetuni frammanundan, er løgtingsformaður, tá ið tingið kemur saman ólavsøkudag 1995 og skipar fyri løgtingsformansvali, eftir at løgtingið er sett.

Løn sum landsstýrismaður

Nýggi løgtingsformaðurin kemur undir somu skyldur sum landsstýrismenninir, tá tað snýr seg um løn og aðrar skyldur. Hann kann ikki hava annað borgarligt starv, og lønin verður sum hjá landsstýrismonnunum.

Vit hava ikki fingið váttað, hvør verður formaður, men keldur bæði í samgonguni og andstøðuni rokna við, at tað verður Jógvan Ingvard Olsen, sum hetta seinasta árið hevur verið tingskrivari. Tað starvið dettur burtur á ólavsøku. Politikarar í øllum flokkum virða hann høgt, og andstøðupolitikarar hava sagt blaðnum, at teir hava als einki í móti at velja hann til formann. At formaðurin hevur breiða undirtøku verður mett at vera heppið undir nýggju stýrisskipanini.

Jógvan Ingvard Olsen hevur royndir í løgtingsarbeiðnum síðani 1970, hann hevur verið landsstýrismaður í eitt ár, hann hevur verið tingformaður eitt skifti, og hann er 65 ára gamal og tiskil komin so væl til árs, at tað er lítið sannlíkt, at hann fer at royna at koma fram í fremstu partapolitisku rað.

-nes



Marita Petersen fer at leggja frá sær sum løgtingsformaður, tá tingið verður sett ólavsøkudag. Hvør kemur í hennara stað, hevur ikki eydnast okkum at fingið uppspurt. Tó bendir alt á, at nýggjur tingformaður verður Jógvan Ingvard Olsen úr sambandsflokkinum

